

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 04 - 2012

# Hægri skatt á olju í Norðsjónum

Leiðandi búskaparfrøðingar í Danmark mæla til at leggja hægri skatt á oljuna í Norðsjónum. Hetta skal koma felags ríkiskassanum til góðar, verður sagt. Tíðindastovan Ritzau hevur savnað eitt sonevnt búskaparligt pallborð við búskaparfrøðingum frá bankum, áhugabólkum og lærdum háskúlum. Og 60 prosent av hesum búskaparfrøðingunum meta, at tað hevði verið skilagott at leggja hægri skatt á oljuna í Norðsjónum. Boðini frá búskaparfrøðingunum hjá Ritzau koma í kjalavørrinum av, at sonevnda umhvørvis-búskaparráðið kom við somu viðmælum fyrr í ár. Men hóast fleiri innan økið sostatt eru av somu sannføring, er tað langt frá víst, at skatturin á norðsjóvaroljuni verður hægri. Bent Greve, professari á lærda háskúlanum í Roskilde, vísir í danska Jyllands-Posten á, at fyrrverandi danska stjórnin gjørdi eina avtalu við A. P. Møller-Mærsk, sonevnda Norðsjóvaravtalan, har skattingin er fastløgd. Tískil er hetta ein trupul støða. Avtalurnar eru greiðar, og tær eru vit noydd at virða og halda. Tað kann tó vera eitt gott hugskot at endurskoða avtalurnar, soleiðis at samfelagið fær ein størri part av ágóðanum, oljan kastar av sær, sigur Bent Greve við Jyllands-Posten. Sostatt er ógreitt, hvat kemur at henda við skattingini av oljuni í Norðsjónum. Greitt er tó, at eitt sokallað tænastueftirlit av Norðsjóvaravtaluni er sett í verk og skal verða liðugt í heyst. Hetta hevur umhvørvis- og orkuráðharrin Martin Lidegaard syrgt fyri. Samstundis mæla danski Javnaðarflokkurin og Sosialistiski Fólkaflokkurin til nýggjar samráðingar um avtaluna, men hesum eru tey í A.P. Møller-Mærsk ikki áhugað í.